


# Úr milliardayvirskoti til undirskot eftir einum ári

**Jógvan Hugo Gardar**

19.10.2015 - 16:11

Oljan.fo

Veitingarfyritøkan Halliburton, ið illum annað er ein risi innan oljuídnaðin, merkir nú av alvara at oljuprísurin er lágur. Í morgun legði fyritøkan fram rokniskapin fyri triðja ársfjórðing, og hann vísir eitt undir skut uppa 54 milliónir dollarar. Sama tíðarskeið í 2014 vísti rokniskapurin eitt yvirskot uppá 1,2 milliardir dollarar.

Inntøkurnar hja fyritøkuni fullu úr 8,7 milliardum niður í 5,58 milliardir dollarar.

Í viðmerkingunum visir fyritøkan serliga til at marknaðurin í Norður-Amerika er viknaður.